# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Mín niðurstøða er, at eg havi ikki virðing fyri floksleiðsluni, og so havi eg einki í at velja*
*(Pia Christmas-Møller)*

# Stórkavi í USA og Kanada



*Í Kanada er nógvur kavi komin niður. Hendan myndin er úr miðbýnum í Montreal*

*Mynd: Reuters*

**Minst 10 fólk hava latið lív í vetrarveðri í USA og Kanada**

Veturin hevur av álvara gjørt um seg í pørtum av Norðuramerika teir seinastu dagarnar. Bæði har vesturi og har eysturi er nógvur kavi komin niður, og harafturat hevur vindurin verið nógvur.

Har eysturi í Kanada lá flogferðslan still í gjár, og nógvastaðni var eingin skúlagongd, tí tað skúlabussarnir sluppu ikki vegin fram. Í Nýfunnalandi og Labrador fór streymurin nógvastaðni.

Myndugleikarnir siga, at illveðrið hevur kravt minst tíggju mannalív í Kanada og USA. Í amerikanska statinum Oregon var ódnarveður fyrradagin, og skriðulop oyðiløgdu fleiri vegir og elveitingina.

# Christmas-Møller floksleys

**Pia Christmas-Møller hevur tikið seg úr konservativa tingbólkinum, men sigur, at hon styðjar framvegis stjórnina**

- Hetta er ein trupul avgerð, men tá ein aftan á drúgva umhugsan er komin til ta niðurstøðu, at ein hevur ikki ta neyðugu virðingina fyri floksins leiðslu longur, so havi eg ikki annað í at velja enn at taka meg burtur úr tingbólkinum.

Tað segði Pia Christmas-Møller í morgun, eftir at hon hevði kunnað Bendt Bendtsen, floksformann og formannin í tingbólkinum, Helge Adam Møller, um avgerð sína. Hon vissaði teir samstundis um, at hon framvegis styðjar ta borgarligu stjórnina, so í fyrsta umfari ávirkar ikki tað parlamentariska grundarlagið hjá stjórnini, at annar stjórnarflokkurin missir ein tinglim.

Spurd, hvat fekk hana at taka eina so stóra avgerð, svaraði tann roynda fólkatingskvinnan, at tað er ein long frágreiðing aftan fyri avgerðina, og at hon legði ikki í at fara í smálutir. Hon viðgekk kortini, at tað vóru nakrar viðmerkingar til nakrar greinar, sum hon hevði skrivað í Politiken í heyst, sum fingu bikarið at flóta yvir. Í greinunum nevndi hon møguleikan fyri at lata danir fáa eina fólkagatkvøðu um tann nýggja ES-sáttmálan. Tað fall ikki í góða jørð hjá hennara egnu floksleiðslu, sum eisini kom við nøkrum hvassorðaðum viðmerkingum í Jyllands-Postinum.

Politiskir eygleiðarar í Keypmannahavn vísa samstundis á, at Pia Christmas-Møller var sera vónbrotin, tá hon herfyri misti starvið sum framsøgufólk hjá konservativa flokkinum, og hjá henni var tað eisini eitt stórt vónbrot, at hon ikki bleiv ráðharri aftan á valið í 2001 og heldur ikki eftir valið í 2005.



*Pia Christmas-Møller hevur sitið í Fólkatinginum síðani í 1987, og eitt skifti í 1998 og 1999 var hon formaður í Konservativa Fólkaflokkinum. Hon hevur verið framsøgufólk hjá flokkinum í fíggjarmálum, almannamálum og arbeiðsmarknaðarmálum*

## STUTT SAGT

### Lupu á tangaskip

Síðani Umaru Yar'Adua tók við sum forseti í Nigeria fyri einum hálvum ári síðani, eru sjóræningaálopini á fremmand skip fækkað munandi, men í gjár søktu sjóræningar at einum tangaskipi hjá amerikanska oljufelagnum ExxonMobil í Bonny-ósanum har suðuri í Nigeria. Sambært myndugleikunum vóru sjóræningarnir átta í tali, og teir komu til skipið í einum skjóttgangandi báti. Tað er ikki heilt greitt, hvat so hendi, men tangaskipið er í hvussu er komið í havn, skrivar AP. Stjórnin hjá Umaru Yar'Adua, forseta, roynir at fáa vápnahvíld við allar sjóræningabólkarnar, so skipaferðslan kann fáa frið.

### Funnu barn í ruskposa

Tveir menn, sum savna burturkast í jordanska høvuðsstaðnum Amman, fingu ein hvøkk fyrramorgunin, tá teir funnu eitt pinkubarn í einum ruskposa. Menninir savnaðu rusk undir einari brúgv í Amman, tá teir brádliga hoyrdu barnagrát. Tá teir fóru at vita, hvat tað var, funnu teir ein nýføddan drong í einum ruskposa undir brúnni. Myndugleikarnir í Amman siga, at drongurin var nakin og kaldur, tí tað var kalt í veðrinum. Drongurin var blánaður um kroppin og græt, sigur Omar Abbadi, sum er talsmaður hjá myndugleikunum í jordanska høvuðsstaðnum.

### Kann stilla upp

Nú er líkt til, at tann konservativi Lee Myung-bak verður valdur til forseta í Suðurkorea á valinum um fjúrtan dagar. Fyri nøkrum døgum síðani bleiv hann lagdur undir svik í sambandi við brot á lógina um handil við partabrøvum, men í gjár varð skuldsetingin slept, tí ákæruvaldið sigur seg ikki hava nakað prógv í málinum. Í veljarakanningunum hevur Lee Myung-bak ligið um 40 prosent av atkvøðunum og langt framman fyri hini valevnini.